## Jólakonsert í Glyvra kirkju

Komandi sunnudag klokkan 17 hevur Nes Sóknar Musikkfelag sína árligu jólakonsert í Glyvra kirkju. Við á konsertini verður eisini ein Messing Kvintett úr Havn. Hornorkestrið fer at spæla kend løg. Millum annað White Christmas, Heddwig´s Theme, The Little Drummer Boy, Memory og nøkur føroysk jólaløg. Messing kvintettin kemur at framføra trý stykkir, Queen of Sheeba, Rudolf the Red Nosen Teinder og Christmas Crackers. Dirigentur verður Kenneth Jones.




## Kandis avlýst konsertir

Best umtókti dansibólkurin í Danmark, Kandis, hevur avlýst allar konsertir hjá sær restina av hesum árinum. Orsøkin er, at kona sangaran í bólkinum doyði í vikuni, bert 41 ára gomul. Kandis er ein sera virkin bólkur í donskum tónleiki, men Johnny Hansen og hansara menn fara ikki á pallin aftur í hesum árinum.




*Magni Laksáfoss á veðurlagsráðstevnu, sum Innlendismálaráðið og Umhvørvisstovan skipaðu fyri á Hotel Føroyum í gjár*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Tann síðsta olj

**Oljan í heiminum er um at ganga undir. Men í Føroyum brúka vit næstan bara olju. Tí noyðast vit at fara frá oljuni, áðrenn hon fer frá okkum. Hetta er greiði boðskapurin frá Magna Laksáfoss, búskaparfrøðingi**

UMHVØRVI
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Vit mugu minka um orkunýtsluna, gera íløgur í varandi orku og seta okkum greið mál og reglur. Soleiðis ljóðaði niðurstøðan hjá Magna Laksáfoss, búskaparfrøðingi og tinglimi, tá hann, undir heitinum "Grøn búskaparlig útlit", bar hugsan sína fram á veðurlagsráðstevnuni á Hotel Føroyum í gjár.

### Brúka tvær tunnur, finna eina

Oljan, hví er hon ein trupulleiki?

*Tú ynskir tær ikki at hava stóra skuld tá karrusellin steðgar... Skuld er nakað, sum einans kann handfarast í einum samfelag við stórum búskaparvøkstri. Búskaparvøkstur hava vit einans havt, tí vit hava havt ríkiligt av ótrúliga bíligari olju. Tá oljan steðgar, steðgar búskaparvøksturin, og tá steðgar møguleikin fyri at handfara skuld."*

*Andrew McNamara, member of the Queensland (Australia) Parliament, August 24, 2005*